Kári P. Højgaard

(59), viðhvørt verður spátt, at Sjálvsstýrisflokkurin ikki fær umboðan aftur á løgting eftir næsta val.

Hvat væntar tú?
- Jú, tað fáa vit. Tað eri eg púrasta sannførdur um. Eg havi góðar vónir um flokkin, og eg vænti, at vit í minsta lagi fáa eitt umboð aftrat á komandi vali, soleiðis at umboðini tá gerast trý í tali.

Hvussu metir tú, at framtíðina hjá flokkinum sær út?
- Eg haldi, at framtíðin hjá Sjálvsstýrisflokkinum sær bjørt út. Hinir størru flokkarnir hava spælt fallit. Eg trúgvi, at framtíðin fyri teir smærru flokkarnar er ljósari enn framtíðin hjá fleiri av teimum størru flokkunum.

Var tað ein stór avgerð ikki at lata teg stilla uppaftur til formansvalið í flokkinum?
- Ja, á ein hátt var hetta ein stór og tung avgerð, og soleiðis vil tað nú altíð vera, tá tú hevur umboðað flokkin so leingi. Men eg haldi samstundis, at hetta var ein røtt avgerð.

Hvat siga tínir veljarar til, at tú – uttan val – lat formanssessin upp í hendurnar á einum akademikara?
- Eg haldi, at tað hevur verið stórt forstáilsi fyri míni avgerð, eisini millum mínar veljarar. Eg fylli 60 ár komandi summar, og eg helt, at løtan nú var hin rætta. Eg helt eisini, at best er við formansskifti undan einum vali.

Stúrir tú ikki fyri, at kósin hjá Sjálvsstýrisflokkinum verður broytt?
- Eitt formansskifti broytir ikki neyðturviliga kósina hjá flokkinum, og tað vænti eg heldur ikki verður í hesum førinum. Vanligt er at byggja á herðarnar hjá teimum undanfarnu, og soleiðis vænti eg eisini, at nýggi formaðurin kemur at gera.

Hvussu leingi aftrat kann hugsast, at Kári P. Højgaard verður partur av tingmanning Sjálvstýrisfloksins?
- Eg ætli mær í hvussu er at stilla upp til eitt ella tvey val aftrat, um flokkurin ynskir tað, sigur løgtingmaður Sjálvsstýrisfloksins.

Myndir: Hallur Thomsen

Kavrotin stórhvalur í Dali

Fyri nøkrum døgum síðani kom ótespuligur gestir rekandi við streyminum inn í mølina í Dali og har hevur hann ligið síðani.

Talan er um ein deyðan stórhval, helst ein Avgust, halda tey í Dali.

Men hann hevur verið deyður leingi, tí hann er kavrotin.

Í Dali stúra tey fyri, at hann fer at lukta rættiliga illa, sum frálíður og tí hava tey verið í sambandi við Vaktar og Bjargingartænastuna um at fáa hann sleipaðan út aftur á streymasjógv so at hann kann verða fyribeindur.

Í MORGIN



Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, ,seinnapartin nakað minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi og hitin millum 1 og 4 stig.

MIKUDAGIN



Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men kanska okkurt kavælið. Hitalagið millum -1 og +2 stig.

HÓSDAGIN



Gul til stívt andøvsgul av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum -1 og +2 stig.

Veðrið fríggjadagin og leygardagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og kavælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið millum -2 og +2 stig.

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið

Hitalagið kring knøttin

Nuuk	5	Tromsø	6	Moskva	16	Athen	26
Reykjavík	11	Bergen	12	Berlin	25	Beijing	30
Tórshavn	10	Oslo	22	Paris	20	New Dehli	30
Lerwick	9	Stokkhólm	20	Madrid	28	Bangkok	34
Aberdeen	12	Keypmannah.	19	Róm	26	Sydney	14
London	19	Helsinki	16	Malorca	26	New York	33

LUFTTRÝSTIÐ



Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1035 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað.



Komandi nátt.
Lágtrýstið við Suður-Noreg grynnist. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur mestsum í stað.

HITALAG



AVFALL



Miðal: 127 mm

VESTFALLSKYRRINDI

15. nov	Mánin longst frá jørðini
21. nov	Fullmáni
28. nov	Seinna kvarter
30. nov	Mánin næstur jørðini

Kelda, Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
22. nov	06:31	18:56	05:31	17:56	05:46	18:11	08:31	20:56	09:31	21:56	04:46	17:11	03:46	16:11	06:46	19:11	07:46	20:11	06:16	18:41	07:31	19:56
23. nov	07:21	19:46	06:21	18:46	06:36	19:01	09:21	21:46	10:21	22:46	05:36	18:01	04:36	17:01	07:36	20:01	08:36	21:01	07:06	19:31	08:21	20:46
24. nov	08:12	20:37	07:12	19:37	07:27	19:52	10:12	22:37	11:12	23:37	06:27	18:52	05:27	17:52	08:27	20:52	09:27	21:52	07:57	20:22	09:12	21:37
25. nov	09:03	21:28	08:03	20:28	08:18	20:43	11:03	23:28	-	12:03	07:18	19:43	06:18	18:43	09:18	21:43	10:18	22:43	08:48	21:13	10:03	22:28
26. nov	09:53	22:17	08:53	21:17	09:08	21:32	11:53	-	00:28	12:53	08:08	20:32	07:08	19:32	10:08	22:32	11:08	23:32	09:38	22:02	10:53	23:17